# fyri fyritøkuni



fyrr í morgun: Tá góvu stjórarnir báðir nevniliga henni og øllum hinum, sum ikki vóru við, eina samanplanting av blómum.

Heilsanin frá stjórunum var greið: - Tillukku sjálv. Og takk fyri innsatsin!




*Hans Andrias Joensen, forstjóri byrjaði sína vinnuligu karrieru sum sølumaður av Sosialinum í heimbygdini.*



*Petra Eystberg Poulsen fær blómur handaðar frá stjóranum, Gunnbjørn Joensen*



*Skrivstovuleiðarin, Sue Philbrow ynskir fyritøkuni blíðan byr framyvir*



*Brøðurnir báðir, Gunnbjørn og Hans Andrias Joensen fegnast um heiðurin. – At ein er komin so langt, kemur ikki av ongum, sigur Gunnbjørn*

## – Alvorligt herðaklapp til okkum øll

**– Høvdu vit ikki so góð starvsfólk her í Hósvík og úti í heimi, bar einki til. Og so høvdu vit heldur ikki fingið ein slíkan heiður, sigur Gunnbjørn Joensen, annar av stjórunum hjá THOR.**

### Ársins virki

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Hósvík:** - Tað er altíð gott at fáa eitt slíkt herðaklapp. Men vit ætla ikki at gevast fyri tað og seta okkum at slappa av, sigur Gunnbjørn.

Hann situr á skrivstovu síni í morgun og hevur úr at gera. Telefonin ringir í heilum, tí fólk vilja ynskja teimum á fyritøkuni tillukku við heiðrinum sum ársins virki í ár. Hetta er eitt greitt tekin um, at onnur eisini vita av og fegnast um arbeiðið teirra.

– Hetta er sum at gerast Føroyameistarar. Tað næsta má væl verða tað at vit gerast Heimsmeistarar, sigur Gunnbjørn við einum smíli.

Her í morgun á skrivstovuni í Hósvík er einki sum bendir á, at teir ætla at seta seg hendir í favn og bara látast sum einki.

– Tað gevur sjálvandi íblástur at fáa ein slíkan heiður. Hetta er haraftrat ein góð og ókeypis reklama fyri fyritøkuna.

– Hetta førir tí vónandi við sær, at vit fáa enn meiri vind í seglini, sigur hann.

### Heimsumfatandi

Við 450 fólkum í starvi og við 22 skipum sum sigla á mongum av heimsins høvum er her talan um eina heimsumfatandi fyritøku. Men slíkt kemur ikki av ongum.

– Styrki okkara er at vit eru álítandi, hava góð fólk rundan um okkum, og sum eru sett at gera tað, sum tey sjálvi eru allarbest til.

– Vit hava somuleiðis royndir á økinum, og kunnu tí taka skjótar avgerðir, tá tað krevst, sigur Gunnbjørn.

Heiðurin sum teimum varð sýndur á Vinnudegnum ger bara framtíðina hjá virkinum enn meiri spennandi.



*Joy Simonsen hevur eitt fjølbroytt arbeiði á skrivstovuni. – Thor var rætti vinnarin sum ársins virki, sigur hon*